


**Nr. 7** *27. mars 2022* **82. árg.**

# Gjøgnum dalin

*„Gangi eg í dimmum dølum, einki ilt eg óttist.*
*Tí tú ert við mær.“ Sálm. 23,4.*

Tá ið eitt seyðafylgi hevur etið grasið á einum staði, leiðir hirðin seyðir sínar til nýggj støð. Vangliga førdi hetta við sær, at tey máttu fara gjøgnum myrkar dalar og kluftir og fjallaskørð. Við stavi sínum leiddi hann fylgið blídliga frameftir, og við keppinum vardi hann tað.

Ein dag fer hirði okkara at gera tað sama fyri okkum. Hann kemur og leiðir okkum til hús síni gjøgnum myrkursins dal. Menniskju, sum ikki kenna evangeliið, kenna hetta versið. Tað stendur skrivað á grøv teirra ókendu og eisini á grøvunum hjá teimum størstu kongunum. Hví eru hesi orð elskað? Her eru nakrar grundir:

**1.** Av tí at vit øll skulu standa andlit til andlits við deyðan. Tað er ein avtala, eingin okkara kann skjóta út, avlýsa ella sleppa undan. Heldur ikki tey, ið gera kropsvenjingar og taka sínar vitamintablettir. Rørsla og heilivágur kunnu kanska leingja um lív okkara, men til endans er ein endi á tí.

**2.** Av tí at okkum tørvar ikki at standa einsamøll yvir fyri deyðanum. Jesus segði: „Eg fari burtur at tilbúgva stað fyri tykkum. Og tá ið eg eri farin burtur og havi tilbúgvið stað fyri tykkum, komi eg aftur og skal taka tykkum til mín.“ (Jóh. 14,2–3).

Tað er ein frásøgn um eina gamla konu í Skotlandi, sum lá at doyggja. Prestur spurdi hana: „Maggie, ert tú bangin at doyggja?“ Hon svaraði: „Nei, pápi mín eigur landið báðumegin ánna.“

Tú, sum eigur Jesus í hjartanum, gleð teg! Tær nýtist ikki at fara einsamøll. Harumframt, uttan mun til hvat ið tú noyðist at sleppa í hesum lívi, er tað einki at rokna aftur ímóti tí, tú fært í tí næsta.

„*… et Ord til Dagen*“ – *Effie Campbell* umsetti.

# Við deyðans mark

Vit vilja so fegin, at øll okkara skulu blíva frelst. Tá ið vit standa við deyðasongina hjá onkrum teirra, fattast okkum ofta orð.

Ein kona segði fyri mær, at tríggjar morgnar upp í slag vaknaði hon og var so órólig. So fór hon at biðja: „Gud, er tað tú, so sig mær, hvat ið tú vilt hava meg at gera fyri teg.“ – Tá hoyrdi hon ta stillu røddina innan í sær siga: „Far niður til systur tína.“

Systirin lá at doyggja á Ríkissjúkrahúsinum. „Ja, eg skal fara; men eg havi ein trupulleika. Eg havi ikki ráð.“ – „Kostnaðin skal eg taka mær av,“ ljóðaði røddin.

Hetta er ein eldri kona, so hon hevur ikki teir nógvu pengarnar millum hendurnar. Tá ið hon ætlar sær til Danmarkar, leggur hon eitt sindur til viks í eitt heilt ár fyri at fáa nóg mikið til ferðaseðilin. Nú átti hon eitt lítið sindur; men tað var langt frá nokk. Hon stúrdi kortini ikki, tí var hetta frá Harranum, syrgdi hann fyri pengunum.

So ringdi telefonin. Ein kona, sum hon kendi, var í hinum endanum. „Eg stóð og vaskaði upp; men eg mátti sleppa grýtunum, tí Harrin talaði til mín og segði, at eg skuldi geva tær 2000 kr. Kann tað bera til?“ spurdi hon. So greiddi henda konan henni frá, hvørji støðu hon var í. – Stutt eftir ringdi ein maður, sum var í slekt við hana, og segði: „Eg haldi, at tú skalt fara niður til systur tína. Tú skalt fáa 5000 kr frá mær.“

So var leyst og liðugt, og hon kundi keypa sær ferðaseðil. Áðrenn hon fór, profeteraði onkur yvir henni: „Tú fert um stutta tíð at lesa upp úr Bíbliuni fyri einum persóni. Tá ið tú hevur gjørt tað, fer viðkomandi at siga: Á, sum hatta var søtt.“

Hon fór so til Danmarkar og gisti hjá einari aðrari systur. Tað tók hálvan annan tíma at koyra haðani og inn á Ríkissjúkrahúsið. Allan tann teinin sat konan á baksetrinum og segði ikki eitt orð. So sigur systirin: „Tú ert so tigandi.“ – „Ja, eg eri í bøn. Eg havi eina missión at gera.“

Konan hevði m.a. biðið um, at friður mátti valda á stovuni, so hon fekk sagt tað, sum hon skuldi. Hon bað eisini, at Heilagi Andin vildi vísa sær, hvat hon skuldi lesa. Hon fekk týðiligt svar aftur: „Les 23. Sálm."

Tá konan kom inn á stovuna, fór familjan hjá teirri sjúku júst avstað. Tá ið hurðin var afturlatin, legði konan hondina á hurðina og bað: „Harri, lat ongan koma inn gjøgnum hesar dyr og órógva."

So sigur hon við systur sína: „Tú mást biðja Jesus fyrigeva tær syndir tínar." – „Ja, men tað geri eg eisini," svarar hin aftur. „Lurta nú væl eftir, so skal eg lesa eitt petti úr Bíbliuni fyri tær." So las hon hin 23. Sálmin. Tá ið hon var liðug, letur í hini sjúku: „Á, sum hatta var søtt." Hálvtannað samdøgur seinni var hon deyð.

Hvussu talar so Gud við menniskju? Hvussu virkar tað? Skriftin sigur: „Vita tit ikki, at tit eru Guds tempul, og at andi Guds býr í tykkum?" 1. Kor. 3,16 og víðari „Upp á varða mín vil eg stíga, standa á varðbergi mínum og gáa eftir, hvat hann vil tala í mær." Hábakkuk 2,1.

Harrin tosar við einari lítlari, stillførari rødd. „...men Harrin var ikki í harðveðrinum. Eftir stormin kom landskjálvti; men Harrin var ikki í landskjálvtanum. Og eftir landskjálvtan kom eldur; men Harrin var ikki í eldinum. Eftir eldin kom **ljóðið av einari stillførari, lítlari rødd**." (1. Kong. 19,11–12 ensk umseting *NKJV*).

Jesus sjálvur sigur: „Mínir seyðir hoyra reyst mína." (Joh. 10,27). Hann segði ikki, at seyðir hansara hoyrdu kassettubond ella lósu bøkur, hóast alt hetta er av stórum týdningi fyri andaliga vøksturin. Men hann segði, at tey kendu rødd hansara og fylgdu honum. Paulus gremur seg: „Tit eru vorðnir trekir at hoyra." Hebr. 5,11. Støðan er vorðin uppaftur verri nú á døgum. Vit verða yvirfloymd av óljóði. Útlendsku sjónvarpsrásirnar senda nátt sum dag. Vit hava sjónbandaspælara, kassettuspælara, fløguspælara, fartelefon og teldu. Alt hetta stríðist um okkara uppmerksemi. Álopsætlan djevulsins er alla tíðina at yvirfloyma okkum við óljóði og upplýsingum og tíðindum í hesi verð, so at hann fær órógva okkara uppmerksemi og okkara tankar um Gud. Ja, bardagin um oyruni er ómetaligur. Verðin og hennara stimbur hava einki at bjóða okkara innara menniskja.

„Á hvørjum morgni hann vekur mítt oyra, at eg má taka eftir eins og lærusveinar gera.“ Jes. 50,4.

*Effie Campbell.*

# Einar dyr

*Ein maður vitnaði niðri á Kafé Blákrossstovuni. „Tað er talan um einar dyr,“ segði hann, „einar dyr, har vit mugu stíga innum fyri at blíva frelst. „Eg eri dyrnar. Gongur nakar inn um meg, skal hann verða bjargaður,“ segði Jesus í Jóh. 10,9.*

Tað er tíverri ofta soleiðis, at vit mugu heilt niður á botn, áðrenn vit síggja tær bjargandi dyrnar.

Ein fuglur hevði einaferð vilt seg inn í eina kirkju. Hann fleyg yvir ímóti vindeyganum og rendi nevnið í glasrútin og datt niður á gólv av stoytinum. So flaksaði hann upp aftur og fleyg yvir til vindeygað hinumegin. Aftur rendi hann nevið í rútin og datt niður; men meðan hann liggur á gólvinum, fær hann eyga á tær opnu dyrnar. Hann flýgur út gjøgnum dyrnar og er bjargaður.

Onkur hevur sagt, at tað er ein vegur inn í hesa verð, men tveir vegir út úr aftur verðini: himmalvegurin og glatanarvegurin.

Einaferð var tað onkur, sum spurdi Jesus: „Harri, eru tað fá, ið verða frelst?“ Men hann segði við tey: „Stríðist fyri at koma inn ígjøgnum hinar trongu dyrnar.“ Luk. 13,23–24.

Bjóða Jesusi inn í hjarta títt bæði sum Frelsara og Harra. „Men so mongum, sum tóku ímóti honum, teimum gav hann mátt til at verða Guds børn, teimum, sum trúgva á navn hansara.“ Jóhs. 1,12.“

*Effie Campbell.*

---

Lykilin at vinna menniskju kring okkum er ikki at prestar og trúboðarar gerast dugnaligari, men at alt Guds fólk skilir, hvat ið vit eiga í evangeliinum og kann geva tað víðari, einfalt og sannførandi.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 27. mars | **Tekstur:** | Luk. 10,38-42 | **Bíbliuorð:** | Matt. 6,33 |
| 3. apríl | **Tekstur:** | Matt. 26,69-75 Jóh. 21,15-19 | **Bíbliuorð:** | Sl. 103,12 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 8** ***10. apríl 2022*** **82. árg.**





# Bønir

Marconi, sum fann upp tráðleysa telegrafin og fekk Nobel-virðislønina, hevur sagt: „Eg trúgvi á megina í bønini, ikki bara sum kristin, men eisini sum vísindamaður. Ein útvarpssendari, sum ikki er størri enn hond tín, er førur fyri at senda boð tvørtur um heimshøvini, men minsti heilin er uppaftur betri útgjørdur enn nakað, sum menniskju hava funnið upp.

Hitt tráðleysa tólið kann senda bylgjur út til sítt mál. Er tað ikki rímiligt at halda, at tað undrið, sum heili okkara er, kann senda út bylgjur í líki av bønum, sum eisini røkka mál sítt?

Tað er ein vanlukka, um menniskju missa trúnna á bønarinnar megi. Bønin er størsti uggi okkara. Uttan trúgv og uttan ta stóru hjálp eg havi havt av kraft bønarinnar og trúarinnar, hevði eg tapt mangt eitt stríðið, sum eg nú havi vunnið."

Hann hevði varhugan av, at trúgv og vísindi eru sum krókur og lykkja, tey hanga saman. Hetta kemur meir og meir fram á okkara døgum, bæði innan skamta-alisfrøði og vanliga vísind. Í USA t.d. hava teir gjørt eina roynd, har 393 fólk við ógvuliga vánaligum hjarta tóku lut. Tey vórðu býtt sundur í tveir bólkar. Annar bólkurin fekk ein bønarbólk knýttan at sær. Hvør einstakur í bønarbólkinum fekk ein sjúkling, sum hann skuldi biðja fyri. Hann fekk at vita fornavnið á sjúklinginum, og at hann var hjartasjúkur, og hvussu ringur hann var. Hann skuldi síðani biðja fyri heilsustøðuni hjá hesum persóni hvønn dag.

Eingin bað fyri hinum bólkinum. Hvørki læknar ella sjúklingar vistu, hvørjum ið biðið varð fyri. Tá ið royndin endaði, kom fram, at í bólkinum, sum eingin bað fyri, máttu sjúklingarnir fimm ferðir so ofta fáa viðgerð við antibiotika,

og teir fingu tríggjar ferðir so ofta vatn í lunguni. Eingin í bólkinum, sum biðið varð fyri, skuldi hava hjálp at anda í respiratori. Harafurímóti skuldu 12 hava andingarhjálp í hinum bólkinum. Færri doyði í bólkinum, ið biðið varð fyri, sjálvt um hetta ikki var av týdningi fyri hagtølini.

Tá ið vanlukkur hótta, kemur trongdin at biðja fram. Tá fyllast kirkjur, møtisalar og bønhús. Um tað gongur væl, koma fólk bara til brúdleyp, barnadóp, jarðarferðir – og so á jólum. Men vit hava eisini brúk fyri bønarinnar kraft í gerandisdegnum, so vit fáa sálarligu berikraftina, sum er neyðug at koma víðari í lívinum uttan nervatablettir og alkohol.

Í Suðurevropa t.d. er vanligt at síggja fólk allan dagin smúgva sær inn í kirkjuna at biðja eina bøn. Skilligt er, at tey fara styrkt útaftur í lívið og ljósið. Bara eina løtu at savna sína hugsan um bønina ger, at tey orka at bera lívsins byrðar uttan at vera við undirlutan.

Tá ið vit koma saman til gudstænastu, er tað sjálvandi gjørligt at hugsa um alt møguligt annað, t.d. gásasteikina og jólagávurnar. Men tekur tú lut í einari felagsbøn, verður tú ein partur av teimum menniskjunum, tú biður saman við, og friðurin søkkur niður í hjarta títt. Tað nýtist ikki at vera í einari kirkju ella í einum øðrum Guds húsi, at tú biður, um bert tú savnar tína hugsan um bønina. Tað er av stórum týdningi, at tú leggur sál tína í bønina, so tú ikki ramsar hana upp sum av handahógvi.

So leingi, vit ganga á hesi jørð, mugu vit vera blíð og sýna næstakærleika. Men fyri at sleppa at hjálpa øðrum, er tað gott, um onkur vil biðja um hjálp. Tað eru fá, sum sýta at hjálpa. Tað liggur djúpt í okkum øllum at vilja hjálpa. Mong halda, at tey plága onnur, tá ið tey biðja um hjálp. Tað er skeivt. Tvørturímóti geva vit tí menniskjanum eina gávu. Vit geva tí okkara álit og siga, at viðkomandi er eitt virðismikið menniskja, sum vit hava brúk fyri.

Takkarbønin er góð. Tá ið dagurin er at enda komin, er takkarbønin besti mátin at fáa friðin at søkka niður í sinnið, og tað er besta sovitablettin at kunna líta at sær sjálvum í speglinum og siga takk, at tú slapst at gera lívið lættari og ljósari fyri onnur. Og bið so um hjálp at gera tað enn betri í døgunum, sum liggja fyri framman.

*Effie Campbell* umsetti.

# Gud hører bønner i dag som før

*Gud hører bønner i dag som før*
*bønnen er nøklen til nådens dør.*
*Bønnen kan smelte selv is og sne.*
*Glem derfor aldri å be.*

*Dypere inn i bønnen,*
*fylle den må ditt sinn.*
*Vil du seier få, må i bønn du gå,*
*Dypere, dypere inn.*

2. *Alt hva du ber om vil Herren gi,*
*bundne han setter i lenker fri.*
*Himmelens sluser deg kraft vil gi,*
*blott du til bønnen tar tid.*

3. *Be for de ufrelste, be, ja be.*
*Selv om du aldri får frukter se.*
*Tenk om du hjemme i himlens kor,*
*ser dem blant skaren så stor.*

4. *Markene hvite til høsten står,*
*ennå så mange i verden går.*
*Timene iler så fort av sted,*
*glem derfor aldri å be!*

# Ein krypladur kristindómur

Kraftin í fyrstu meinigheitini var so ovurmikil, at tá ið Pætur kom gangandi gjøgnum Jerusalems gøtur, bóru fólk tey sjúku út, og tá ið skuggi hansara fall á tey sjúku, vórðu tey grødd. Áps. 5,15–16. Tey høvdu kraftiga veking í Jerusalem.

Onkur hevur sagt tað soleiðis: „Kristindómurin byrjaði sum ein veking í Jerusalem, men broyttist til filosofi (heimspeki), tá ið hann kom til Grikkalands, og til ein stovn, tá ið hann kom til Róm, og til eina mentan, tá ið hann kom til Evropa, og til eina handilsvøru, tá ið hann kom til USA.

Vit mugu venda aftur til tað upprunaliga. Bíbliulestur og nógv bøn er svarið.

*Effie Campbell* umsetti.

# Áhaldandi bøn

*„Verið áhaldandi í bønini.“ Róm. 12,12.*
*„Megnað bøn av rættvísum manni er mikið ment.“ Jákup 5,16.*

Ein trúgvandi mamma hevði stórar trupulleikar av sínum uppreistrarhugaða soni. Hann var í ungdómsárum, og hann var latur, illsintur, snúðin, og hann bæði leyg og stjól.

Seinni í lívinum gjørdist hann ein virðismettur advokatur; men lív hansara var merkt av verðsligum málum og miðum, og hann tráaði eftir at vinna nógvan pening. Moralurin var lágur. Hann búði saman við ymiskum konufólkum eftir tørni og fekk ein son við eini teirra. Eitt tíðarskeið var hann uppi í einari løgnari religiøsari sekt, og tá gjørdi hann mangt løgið.

Alla tíðina bað mamman fyri honum. Ein dagin gav Harrin henni eina sjón, og hon fór at gráta: Hon sá Jesu Kristi ljós innan í soninum, og alt andlitið á honum broyttist.

Hon mátti bíða í 9 ár afturat, áðrenn sonurin gav Jesusi Kristi lív sítt. Hann var tá 32 ára gamal. Navnið á soninum var Augustin. Hann gjørdist ein av størstu teologunum í kristinheiminum. Hann segði altíð, at hann bleiv umvendur, av tí at mamman var so áhaldandi í bønini.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað, at geva til Guds ríkis arbeiði, er sum at gera íløgur í eitt virki, sum eigur at fáa yvirskot, og her fæst 100% avkast. (Mál. 3,10). Alt gerst dýrari; men mong geva tað sama sum fyrr. Eg hugsi, at vit mugu fara inn fyri Gud og spyrja: „Hvussu nógv skal eg geva, og hvussu nógv skal eg hava eftir?”

*e.c.* ums.

---



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum einar gleðiligar páskir í Jesu navni!***



---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 10. apríl | **Tekstur:** | Matt. 26,33-35 + 69-75 | **Bíbliuorð:** | 5 Mós. 31,6c |
| 17. apríl | **Tekstur:** | Matt. 28,1-15 | **Bíbliuorð:** | Matt. 28,6 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74